**ISBN 99918-971-7-8**

# Fjarferðing í Føroyum

Dennis Holm

*Granskingardepilin fyri Økismenning*

**ARBEIÐSRIT NR. 8/2004**

*Um arbeiðsrit:*

**Arbeiðsrit eru samfelagsfakliga grundað arbeiði, sum eru minni í vavi og dýpd enn veruligar granskingarverkætlanir. Hesi rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. kanningararbeiði sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvisingar- og kunningartilfar ella líknandi. Arbeiðsrit vera altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til útgávu í Arbeiðsriti, eru tey vælkomin at seta seg í samband við depilin (sí adressu á forsíðuni).**

## Innihaldsyvirlit

Úrtak ... 3
Inngangur ... 3
Fjarferðing í Føroyum ... 4
Fjarferðing og fjarferðar ... 6
Hví viðgera fjarferðing og bústaðarkommunur í Føroyum? ... 8
Búskaparkreppan og miðsavning av arbeiðstilboðum ... 8
Lokal tænastutilboð ... 9
Ávirkar fjarferðing lokalsamfelagið? ... 10
Vanligar kommunur og bústaðarkommunur ... 11
Tvær bústaðarkommunur í Føroyum ... 12
Hósvíkar Kommuna ... 12
Kommunal skipan ... 15
Almennar tænastur ... 16
Broytingar í fólkatalinum ... 17
Kvívíkar Kommuna ... 18
Kommunal skipan ... 20
Almennar tænastur ... 21
Broytingar í fólkatalinum ... 22
Fjarferðar og bygdarlív ... 23
Fjarferðar í Hósvík og Kvívík ... 24
Sosiala lívið í Hósvík og Kvívík ... 24
Fjarferðing sum ein persónlig ætlan ... 27
Bústaðarkommunur og kommunalar raðfestingar ... 29
Raðfesting hjá borgarum og kommunu í Hósvík og Kvívík ... 29
Samandráttur og niðurstøða ... 34
Kort 2. Útbyggingin av føroyska vegakervinum ... 36
Bókmentir ... 37

## Úrtak

*Hetta arbeiðsritið viðgerð evnið fjarferðing, sum í stuttum merkir: at ferðast dagliga langa leið ímillum bústað og arbeiðspláss. Viðgerðin í arbeiðsritinum fevnir um eina meiri almenna lýsing av sjálvum hugtakinum "fjarferðing", og í hesum sambandi verður eisini lýst, hvørji viðurskifti vanliga hava týdning, tá granskað verður innan hetta evnið. Harumframt er eisini ein meiri útøkilig viðgerð viðvíkjandi fjarferðing í Føroyum, har tvær føroyskar kommunur, Hósvíkar og Kvívíkar kommunur, eru brúkt sum dømir.*

*Arbeiðsritið er grundað á bókmentir og vísindaligar greinar, og harumframt á samrøður og spurnarblaðskanningar í Hósvík og Kvívík.*

## Inngangur

Í teimum framkomnu ídnaðarsamfeløgunum er tað vorðið alsamt meiri vanligt at ferðast langa leið millum bústað og arbeiðspláss – at fjarferðast (*á donskum: at pendla*) millum bústað og arbeiðspláss. Í pørtum av Føroyum er fjarferðing eisini vorðin ein natúrligur partur av gerandisdegnum í fleiri kommunum. Hetta hevur eisini ført við sær, at summar føroyskar kommunur í dag kunnu sigast bera eyðkenni av at vera bústaðarkommunur. Hetta arbeiðsrit viðgerð tvær kommunur, ið bera hesi eyðkenni.

Galdandi fyri kommunurnar, ið hetta arbeiðsritið viðgerð, er, at tær báðar eru tætt við Tórshavn. Hartil er eisini galdandi, at ein stórur partur av bygdafólkinum í arbeiðsførum aldri dagliga fjarferðast til arbeiðis í Tórshavnarøkinum. Í hesum sambandi verður tikin upp spurningurin um, hvørja ávirkan tað hevur á bygdarlívið, at ein stórur partur av bygdafólkinum arbeiðir uttanfyri bygdamark og tí er burturi úr bygdini stóran part av degnum.

Arbeiðsritið viðgerð eisini spurningin um fjarferðing sum liður í eini persónligari ætlan (strategi). Meiri nágreiniligt, hví fólk hava valt at seta búgv á einum stað og arbeiða á øðrum stað. Í hesum sambandi verður kannað, hvørjar orsøkirnar til fjarferðing kunnu vera?

Hetta arbeiðsritið nertir eisini við spurningin um ávirkan á kommunal-politiskar raðfestingar. Hesin spurningur hevur sín uppruna í eini hugsan um, at fjarferðar hava annan tørv á kommunalum tænastum enn teir borgarar í kommununi, sum ikki eru fjarferðar. Hetta kann eisini merkja, at kommunur, har stórur partar av fólkinum eru fjarferðar, noyðast at tillaga lokal-politisku raðfestingini eftir áhugamálunum hjá fjarferðunum.

**Hugtakið *fjarferðing* (*á donskum: pendling*) vísir til samband og samvirkan (interaktion) millum tveir marknaðir: húsamarknaðin og arbeiðsmarknaðin (Andersen, 1999: 1).**

**Í hesum sambandi merkir tað ”*at fjarferðast*”, at ferðast verður millum bústað og arbeiðspláss, og har tað er ein ávís fjarstøða millum bústað og arbeiðspláss.**

## Fjarferðing í Føroyum

Sagt verður ofta um føroysku arbeiðsmegina, at hon ber eyðkenni av at vera flytfør (*á donskum: mobil*). Og tykist tað heldur ikki at vera óvanligt hjá føroyingum at ferðast til arbeiðis, antin innanoyggja ella til londini kring okkum, serliga til Danmarkar, Grønlands, Íslands og Noregs (Dalbø, 2000: 8-9; Mørkøre, 1997: 218-219). Harumframt hava føroyingar seinastu øldina í ávísan mun ferðast millum bygdir og oyggjar til arbeiðis, hetta hóast sambandið millum bygdir og oyggjar ikki altíð hevur verið beinleiðis tillagað hesum (sí Kort 2.).

Búskaparliga-, vinnuligu- og tøkniliga menningin seinastu ártíggjuni, umframt víttfevnandi útbyggingar av undirstøðukervinum (infrastruktur), serliga í vesturheiminum, hava ført við sær, at tað er vorðið alsamt vanligari at ferðast langa leið til og frá arbeiði – at *fjarferðast* til arbeiðis (Andersen, 1999: 7; Pickup og Town, 1983: 1). Eins og í londunum kring okkum, so er tað eisini vorðið vanligt at fjarferðast til arbeiðis í Føroyum. Og hóast tað landafrøðiliga eru nakrar natúrligar avmarkingar fyri, hvussu umfatandi fjarferðingin í Føroyum kann gerast, so eru tað í summum pørtum av landinum góðir møguleikar fyri fjarferðing. Hetta er kanska serliga galdandi fyri fjarferðing í Eysturoynni og Streymoynni. Harumframt skapar framhaldandi útbyggingin av undirstøðukervinum eisini betri møguleikar fyri at fjarferðast úr og í øðrum pørtum av landinum. Millum annað hevur undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund, sum lat upp fyri ferðslu í desember 2002 (www.vagatunnilin.fo), bøtt munandi um møguleikarnar fyri fjarferðing til og úr Vágum. Somu batar vilja eisini gera seg galdandi fyri stórar partar av Norðuroyggjunum (undantikið Kalsoy, Fugloy og

Svínoy), tá undirsjóvartunnil undir Leirvíksfjørð, millum Eysturoynna og Borðoynna[1], verður tikin í nýtslu.

Hóast tað eru lutfalsliga fá hagtøl og lítið granskað viðvíkjandi fjarferðing í Føroyum[2], um samanborið verður við grannalond okkara, so kunnu fleiri bygdir í Eysturoynni og Streymoynni í dag sigast bera eyðkenni av at vera bústaðarkommuna (*á donskum: sovebyer*). Hetta serliga orsaka av, at fólk í arbeiðsførum aldri í hesum bygdum í stóran mun hava teirra dagliga arbeiða uttan fyri kommunu- og bygdamark, og dagliga fjarferðast til arbeiðis, serliga til Tórshavnar.

**Hugtakið *bústaðarkommuna* verður vanliga tulkað sum negativt, men í hesum arbeiðsriti verður hugtakið eisini tulkað positivt, sum ein møguleiki hjá kommunum kring Tórshavn at fáa part í menningini, sum er í høvuðsstaðarøkinum.**

Tað er ikki av tilvild, at Tórshavnarøkið er vorðið høvuðsarbeiðsmarknaður fyri stórar partar av arbeiðsstyrkini í Streymoynni og í pørtum av Eysturoynni. Fyrst og fremst hevur útbyggingin av undirstøðukervinum seinastu ártíggjuni skapt góðar møguleikar fyri fjarferðing til Tórshavnar (sí Kort 2.). Hetta saman við einum alsamt vaksandi tali av privatum bilum (Hagstova Føroya, 2002) og einari betri almennari flutningsskipan, samansett av bussum og ferjum, hevur eisini ført við sær betri møguleikar fyri fjarferðing. Harnæst hevur høgi búskaparvøksturin í landinum seinastu 5-7 árini ført við sær fleiri hægri lønt arbeiðstilboð (Økismenningarnevndin, 2001: 84-86). Hesi arbeiðstilboð eru serliga í Tórshavn, og hevur hetta millum annað gjørt, at fleiri leita sær arbeiði í Tórshavn og fjarferðast millum bústað og arbeiðspláss.

Búskaparvøksturin í Tórshavn hevur seinastu árini verið nakað hægri enn aðrastaðni í landinum (Økismenningarnevndin, 2001: 84-86). Men høgi búskaparvøksturin í Tórshavnarøkinum hevur tó eisini havt við sær negativ árin. Hetta er eitt nú vorðið sjónligt við øktum trýsti á bústaðarmarknaðin í økinum, sum hevur ført við sær hægri prísir á húsamarknaðinum og hægri húsaleigu enn í økinum uttanfyri Tórshavn (Føroya Sparikassi, 2002: 6-7). Hartil koma so trupulleikarnir við bíðilistum á dagrøktarøkinum og øktum tørvi á skúlaøkinum, eldraøkinum o.s.fr. Hesir trupulleikar eru ikki í sama mun kendir uttanfyri Tórshavn (Økismenningarnevndin, 2001: 52, 61), og tykist hetta hava ført við sær, at nøkur fólk hava valt at flyta til bygdir / kommunur uttan fyri Tórshavn og sostatt dagliga fjarferðast til arbeiðis í Tórshavn.

Í triðja lagi er tað hugsandi, at tað eisini hevur havt ávirkan, at tey yngru ættarliðini, sum hava nomið sær útbúgving uttanlands, har hava vant seg við fjarferðing. Í Danmark, har flestu føroysku lesandi eru, er tað ikki óvanligt, at ein verður noyddur at ferðast í ein hálvan til ein heilan tíma millum bústað og útbúgvingarstovnar. Hetta hevur helst ført við sær broyttan hugburð millum yngru ættarliðini mótvegis fjarferðing.

## Fjarferðing og fjarferðar

Í granskingarverkætlanum um fjarferðing og fjarferðar verða vanliga viðgjørd evni sum t.d. býarplanlegging, arbeiðsmarknaðarviðurskifti, vinnulig menning og samferðslu og flutning (Madsen, 1984: 2-4). Tær einstøku føroysku verkætlanirnar innan hetta økið hava eisini viðgjørt evni sum planlegging, samferðsla og flutningur (sí m.a. Rasmussen, 1977, Strandfaraskip Landsins, 2000; Vinnumálastýrið, 1999) .

Alment verður ein fjarferði lýstur sum ein persónur, ið býr í einum lokalsamfelag og arbeiðir í einum øðrum, og sum dagliga ferðast til og frá arbeiði. Men hóast hesa almennu lýsing er tað tó rættiliga ymiskar meiningar um, hvørji viðurskifti hava týdning, tá fjarferðar og fjarferðing verður granskað. Gransking innan fjarferðing og fjarferðar fevnir tí eisini um gransking av fjarferðing millum býarpartar, um bygdar-, býar- og kommunumark til fjarferðing í eina ávísa tíð ella í eina ávísa longd í kilometrum (Madsen, 1984: 1-2). Hartil er tilgongdin til evnið rættiliga ymisk, tá fjarferðing verður granskað. Til dømis vera fjarferðar í summum verkætlanum mettir at vera umhvørvisdálkarar ($CO^2$-dálkarar), meðan fjarferðar í øðrum verkætlanum vera mettir sum ein møguleiki hjá bygdum, býum ella kommunum at økja um lokalu arbeiðsmegina. Sostatt verður fjarferðing í summum granskingarverkætlanum mettur sum ein trupulleiki, meðan aðrar meta fjarferðing sum ein fyrimun og ein møguleika hjá lokalsamfeløgum at mennast.

Í hesum arbeiðsriti verður ein fjarferði lýstir sum ein persónur, ið býr í einari *kommunu* og arbeiðir í eini aðrari *kommunu*, og sum dagliga ferðast til og frá arbeiði, antin í privatum bili ella við almennu flutningsskipanini. Hendan lýsing fevnir eisini um lesandi í miðnámsskúla ella á hægri læristovnum, og fólk, ið eru í læru.

Tá fjarferðing verður granskað, verður oftani skilt millum *sjálvbodna* fjarferðing og *tvungna* fjarferðing við tað, at fólk antin sjálvboðið leita sær arbeiði uttan fyri bygdar- ella býarmark, *ella* verða tvungin til tað orsaka av vantandi lokalum arbeiðstilboðum. Kanningar í USA hava víst, at kvinnur fjarferðast í størri mun enn menn orsaka av

vantandi lokalum arbeiðstilboðum. Somu kanningar vísa harumframt, at húðarlitur eisini hevur ávirkan, og mega afro-amerikanarar í størri mun enn onnur fjarferðast fyri at fáa arbeiðið (Madsen, 1984: 22). Í Danmark hevur eisini verið granskað í sambandinum millum fjarferðing og kyn. Kanningar haðani vísa, at menn fjarferðast longur til arbeiðis enn kvinnur, og er hetta serliga orsaka av, at kvinnur kenna eina avmarking í fríheitini at leita sær arbeiði, eftir at tær hava átt fyrsta barnið (Tkocz og Kristensen, 1994: 2, 5).

Í granskingarverkætlanum, har kannað verður, hví fólk fjarferðast, hevur lønarspurningurin stóran týdning, og vísa nakrar kanningar, at hægri løn hevur ávirkan á, hvussu langt fólk eru sinnað at fjarferðast. Í hesum arbeiðsriti er hesin spurningurin ikki so áhugaverdur, við tað at arbeiðsritið viðgerð fjarferðing í tveimum útvaldum kommunum í Streymoynni. Høvuðsarbeiðsmarknaðurin hjá hesum kommunum er í Tórshavnarøkinum, og eru umleið 25-30 min. til Tórshavnar úr báðum kommunum. Lønarspurningurin er tó áhugaverdur, tá bústaðarkostnaður og kommunal tænastutilboð verða tikin inn í myndina, og samanborið verður millum kommunurnar, ið verða viðgjørdar í arbeiðsritinum, og Tórshavnar kommunu.

Eitt evni, ið tó hevur stóran týdning, tá fjarstøðan til og frá arbeiði verður viðgjørd, er spurningurin um, hvussu sosiala samansjóðingin av lokalsamfelagnum verður ávirkað av, at ein stórur partur av fólkinum í arbeiðsførum aldri dagliga arbeiða uttanfyri kommunumark. Kanningar hjá Liepman í Stóra Bretlandi vísa, at fjarstøðan millum bústað og arbeiðspláss førdu við sær manglandi sosiala samansjóðing í lokalsamfelagnum (Liepman, 1944: 191-192). Hóast bókin hjá Liepman, sum er ein klassikari innan gransking av fjarferðing, er frá 1944 og kanningar hennara frá síðst í 1930unum, so eru nógv av teimum evnunum, sum Liepman viðgerð í bókini ”*The Journey to Work: Its Significance for Industrial and Community Life*”, av týdningi enn í dag, hetta eisini hóast undirstøðukervið, samferðslan og flutningsskipanir sum heild eru broyttar grundleggjandi síðan í 1930ini.

Kanningar í Írlandi og Stóra Bretlandi vísa eisini, at fjarferðing hevur ávirkan á, hvussu lokalsamfelagið verður samansjóðað sosialt. Hesar kanningar vísa, at fjarferðar, sum eru fluttir til bygdasamfeløg, høvdu ávísar trupulleikar við at samansjóðast við tey, ið frammanundan búðu á staðnum (Pickup og Town, 1983: 69-70).

Fjarferðing tykist tó eisini í summum førum verða ein møguleiki hjá fólki í smærri kommunum. Nýggjari vísindaligar kanningar gjørdar í norður Norra vísa, at fólk í

smærri kommunum hava valt fjarferðing sum ein natúrligan part av teirra gerandisdegi. Hetta fyri at tey framhaldandi skulu kunna verða búsitandi í heimbygdini og sleppa undan at flyta til grannabygdina, har arbeiðspláss teirra er. Harumframt vísa kanningarnar, at tað eisini eru aðrar orsakir til, at fólk velja at fjarferðast heldur enn at flyta. Millum hesar eru lægri kommunuskattur, eitt barnavinarligt umhvørvi í heimbygdini, umframt vakurt náttúruumhvørvi og eitt friðarligt umhvørvi at liva í, uttan harðskap og brotsverk (Aure, 2001: 94-112). Kanningarnar í hesum arbeiðsriti kunnu í ávísan mun samanberast við kanningarnar í norður Norra við tað, at fólk í teimum báðum kommununum, sum verða viðgjørdar í arbeiðsritinum, vísa á nógvar av teimum somu grundgevingunum fyri at fjarferðast, sum kanningarnar í norður Norra vísa.

## Hví viðgera fjarferðing og bústaðarkommunur í Føroyum?

Spurningurin, um hvønn leiklut kommunurnar skulu hava í føroyska samfelagnum, hevur seinastu árini verið – og er enn – ein týðandi partur av politiska kjakinum í Føroyum. Millum evnini, sum vera viðgjørd, eru t.d. uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum landið og kommunur, spurningurin um størri kommunalar eindar umframt spurningurin um kommunalt samstarv (sí eisini: Holm og Mortensen, 2002). Tað seinasta álitið, ið viðgerð hetta evnið, er álitið um uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum landið og kommunur, sum leggur upp til, at fleiri uppgávur sum frá líður skulu flytast frá landsumsitingini til kommunurnar at umsita (Løgmansskrivsstovan, 2001). Harumframt verður í álitinum lagdur dentur á, at uppgávurnar skulu loysast so nær borgarunum, sum til ber, hetta tí at mett verður, at kommunan er betur før fyri enn landið at nøkta tørv og ynski hjá borgaranum á staðnum (Løgmansskrivstovan, 2001: 83-84). Spurningurin um at nøkta tørv og ynski hjá borgarunum er eisini ein týðandi spurningur, tá evnið fjarferðing verður viðgjørt, og í hesum høpi ber til at skilja millum tørv á arbeiðstilboðum og tørv á almennum tænastum.

### Búskaparkreppan og miðsavning av arbeiðstilboðum

Eitt úrslit av búskaparkreppuni í Føroyum í fyrru helvt av 1990unum varð, at tað fór fram ein miðsavning av handils- og tænastuvinnunum í Føroyum. Úrslitið av hesum varð m.a., at stórir partar av handils- og tænastufyritøkunum á smáu plássunum kring landið vórðu niðurlagdar, soleiðis at handils- og tænastuvinnan nú í størri mun enn áðrenn búskaparkreppuna er miðsavnað á teim størru plássunum í landinum. Úr hesi framhaldandi miðsavnan eru sprottin hugtøk sum "miðstaðarøki", har sipað verður til Tórshavn og Tórshavnarøkið, umframt Runavíkarøkið.

Miðsavningin í Streymoynni hevur eisini einamest verið til Tórshavnar, við tí úrslitið, at stórir partar av teimum smáu handils- og tænastufyritøkunum uttan fyri Tórshavn eru niðurlagdar. Harumframt er talið av vælløntum arbeiðstilboðum vaksið í Tórshavn, millum annað orsaka av stóra búskaparvøkstrinum í landinum sum heild og orsaka av eini størri almennari umsiting. Hesin vøksturin hevur eisini ført við sær økt virksemi í hjávinnum í Tórshavnarøkinum, t.d. innan tænastu- og byggivinnuna, og sostatt er eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi til hesar vinnur eisini øktur. Stóri tørvurin á arbeiðsmegi í Tórshavn endurspeglast eisini í, at ein týðandi partur av arbeiðsmegini í Streymoynni (uttanfyri Tórshavn) arbeiðir í Tórshavn. Í 1999 arbeiddi út við helvtin av arbeiðsstyrkini í Streymoy (uttanfyri Tórshavn) í Tórshavn[3] (Hagstova Føroya, persónligt samskifti). Hetta hevur eisini ført við sær økta nýtslu av handils- og tænastuvinnum í Tórshavn, við tað at fólk, sum arbeiða í - men búgva uttanfyri Tórshavn, fara til handils í Tórshavn á veg heim frá arbeiði. Eitt mynstur, ið eisini er kent í bæði Fraklandi og Stóra Bretlandi (Pickup og Town, 1983: 67-68).

## Lokal tænastutilboð

Umframt møguleikarnar fyri at fara til arbeiðis, so hava almenn tænastutilboð eisini stóran týdning í gerandisdegi okkara, og tykjast hesar tænastur fáa alsamt størri týdning, tá avgerð skal takast um, hvar ein skal seta búgv. Hetta serliga viðvíkjandi almennum tænastum innan barnaansing, skúla og heilsu- og eldrarøkt. Hesar tænastur eru í dag í ávísan mun kommunal ábyrgdarøki og verða fyriskipaðar av kommununum, antin av teirri einstaku kommununi ella í samstarvi millum kommunur.

Víst varð á í brotinum omanfyri, at búskaparvøksturin í Tórshavnarøkinum hevur verið stórur og hevur ávirkað flest allar vinnur í økinum. Men tann stóri búskaparvøksturin hevur eisini ført við sær alsamt vaksandi lokalan tørv innan barnaansingarøkið, skúlaøkið og eldrarøkt, umframt einum stórum bústaðartørvi. Kommunalu útreiðslurnar innan nøkur av hesum økjum eru eisini øktar munandi seinastu árini. Til dømis fóru í 1999 sløk 12 % av útreiðslunum hjá Tórshavnar Kommunu til barnaansing, meðan fleiri enn 21 % fóru til sama endamál í 2001 (www.torshavn.fo). Men øktu útreiðslurnar hava tó ikki nøktað tørvin á barnaansingarøkinum. Trupulleikarnir á barnaansingarøkinum í Tórshavn eru eisini vorðnir alsamt sjónligari seinastu árini. Millum annað hevur foreldrafelagið í Tórshavn víst sína ónøgd í opnum brævið til Tórshavnar Kommunu í 2001 (Sosialurin, 29. sept. 2001), umframt at roynt varð at fáa trupulleikarnar á dagrøktarøkinum í Tórshavn settar á dagsskránna til Løgtingsvalið í apríl 2002 (Sosialurin, 31. jan. 2002).

Kommunurnar uttanfyri Tórshavn hava ikki í sama mun sum Tórshavnar Kommuna trupulleikar á barnansingarøkinum, og ber heildarmyndin eyðkenni av smáum bíðilistum, um nøkrum yvirhøvur. Harumframt hava hesar kommunur ikki sama tørv á útbyggingum á skúlaøkinum sum Tórshavnar Kommuna, hóast tørvur er á smærri um- og útbyggingum, einamest orsaka av krøvum í nýggju Fólkaskúlalógini[4]. Hvat viðvíkur eldraøkinum, er tørvur á fleiri íløgum í so at siga øllum pørtum av landinum, við tað at hetta økið ikki hevur verið raðfest í undanfarnum árum. Ein av orsøkunum til hetta er, at eldraøki er ein landsuppgáva og ikki ein kommunal uppgáva, sum til t.d. barnaansingin er. Vantandi íløgur á eldraøkinum á landsfíggjarlógini hava tó ført við sær, at fleiri kommunur hava bygt eldrasambýli fyri á tann hátt at nøkta lokala tørvin á eldraøkinum.

Umframt almennu tænastutilboðini eru frítíðartilboð eisini ein týðandi partur av lívi okkara. Umframt ítróttina fevna hesi tilboð m.a. um biohøllir, listaskálar, konserthøllir, matstovur, barrir og vertshús, og eru hesi í stóran mun bert at finna í Tórshavn (ella á størri plássunum). Av somu orsøk er ein í nógvum førum noyddur at ferðast til Tórshavnar (ella størri plássini) fyri at gera nýtslu av hesum tilboðum. Hvat viðvíkur ítróttini, so eru møguleikarnir fyri at íðka ítrótt, t.d. fótbólt, hondbólt, flogbólt, og svimjing í ávísan mun avmarkaðir til tey størri plássini í landinum, og av somu orsøk eru fólk í smærri bygdum og kommunum noydd at ferðast millum kommunur fyri at nøkta tørvin á hesum økinum.

## Ávirkar fjarferðing lokalsamfelagið?

Úrslitið av miðsavningini í Streymoynni hevur í stóran mun ført við sær, at Streymoyggin er broytt til eitt funktionelt økið[5], bundið saman av fjarferðing, við Tórshavn sum miðstaði. Hartil er farin fram ein skilnaður av arbeiðsstaði og bústaði, soleiðis at fólk, sum búgva uttan fyri Tórshavn, í stóran mun arbeiða í Tórshavn. Afturat hesum eru stórir partar av teimum sosialu aktivitetunum uttan fyri lokalsamfelagið við tí úrsliti, at fólk eisini á hesum øki verða noydd at leita sær út um bygdamark. Vísindaligar kanningar av hesum viðurskiftum í Stóra Bretlandi vísa, at fjarferðar so líðandi missa áhuga og virkni (engagement) í lokalsamfelagnum, bæði tá tað snýr seg um t.d. at keypa inn lokalt og at luttøka og vera virkin í sosialum tiltøkum (Pickup og Town, 1983: 71).

Vansar eru sostatt við fjarferðing, men fjarferðing er tó ikki einsíðis negativ. Fjarferðing kann eisini vera ein møguleiki hjá smærri kommunum / bygdum at yvirliva og mennast, við tað at fólk í kommununi gera nýtslu av arbeiðstilboðum aðrastaðni. Í hesum

sambandi kann fjarferðing gerast ein beinleiðis partur av eini lokalari menningarætlan, har kommunan raðfestir tað at skapa eitt gott bústaðarumhvørvi framum onnur viðurskifti. Í slíkum føri verður barnaansing, skúli, eldrarøkt, frítíðartilboð o.s.fr. raðfest framum tað at skapa góðar karmar fyri vinnulívi, sum aloftast krevur stórar íløgur og leggur stórt trýst á kommunala búskapin[6]. Í tráð við hetta gerst fjarferðing ein møguleiki hjá smærri kommunum at mennast, har tað at skapa góðar karmar sum ein bústaðarkommuna verður sett ovast innan lokalpolitisku raðfestingina. Av somu orsøk gerst tað áhugavert at spyrja *í hvønn mun fjarferðing ávirkar bygdarlívið og kommunalu raðfestingina?*

## Vanligar kommunur og bústaðarkommunur

Í fleiri føroyskum bygdum og kommunum hevur kommunan havt ein týðandi leiklut í lokalu menningini. Í 1970unum og 1980unum var tað ikki óvanligt, at kommunur luttóku beinleiðis í menningini av lokala vinnulívinum[7]. Og í fleiri førum vóru kommunur beinleiðis partaeigari – og mangan tann størsti partaeigarin – í lokalum flakavirkjum og fiskiskipum (Apostle, Holm, Hovgaard, Høgnesen og Mortensen, 2002). Við nýggju Kommunustýrislógini, ið kom í gildi í 2000, vórðu hesi viðurskifti broytt, soleiðis at kommunur nú ikki kunnu luttaka beinleiðis í vinnuligum virksemi (Kommunustýrislógin, 2000: § 50). Endamálið við Kommunustýrislógini í hesum sambandi er at gera ein greiðan skilnað millum alment og privat virksemi, og skal leikluturin hjá kommununi sostatt bert vera at skapa karmar fyri lokalari vinnu.

Umframt at skapa karmar fyri vinnuna hava kommunurnar seinastu árini fingið fleiri nýggjar uppgávur, einamest tí at tilboð innan barnaansing, skúla, frítíðarvirksemi og eldrarøkt[8] hava fingið alsamt størri týdning, men eisini orsaka av, at nakrar av hesum uppgávum nýliga eru fluttar til kommunurnar at umsita. Hugsandi er, at bústaðarkommunur í størri mun enn vanligu kommunurnar leggja seg eftir at røkja hesar uppgávur og nøkta tørvin innan hesi øki. Á tann hátt gerast t.d. góð tilboð á barnaansingarøkinum ein beinleiðis partur av menningarætlanini hjá kommununi – og er hetta m.a. ein leistur, ið nakrar kommunur í Streymoynni hava valt fyri at fáa fólk at flyta til kommununa. Borgarstjórin í Hvalvíkar kommunu vísti m.a. á, at tá Hvalvíkar kommuna fór undir at byggja barnagarð í Hvalvík, varð barnagarðurin bygdur væl størri, enn tørvur er á í Hvalvíkar kommunu. Ein av orsøkunum til hetta var, at kommunan vildi vísa á, at tilboðini á barnaansingarøkinum vóru góð og á tann hátt gera kommununa áhugaverda at búseta seg í (Sjónvarp Føroya, Jan. 2003).

## Tvær bústaðarkommunur í Føroyum

Við árslok 2002 búðu 21.733 fólk í Streymoynni. Av hesum búðu 18.420 fólk í Tórshavnar Kommunu, meðan 3.313 fólk búðu í hinum sjey kommununum í oynni (Hagstova Føroya, 2003). Í hesum partinum er ein lýsing av tveimum kommunum í Streymoynni, Hósvíkar- og Kvívíkar kommunum (sí Kort 1 niðanfyri).




**Kort 1. Hósvíkar- og Kvívíkar kommuna** (www.cre8.fo)

Sum nevnt, bera bæði Hósvíkar og Kvívíkar kommunur eyðkenni av bústaðarkommunum. Báðar kommunur eru tætt við Tórshavn, har stórur partur av fólkinum í arbeiðsførum aldri eisini arbeiðir. Hartil vísir ein kanning, ið Granskingardeplinum fyri Økismenning gjørdi á sumri 2001, at fólk í Hósvík og Kvívík í stóran mun gera nýtslu av handils- og tænastu tilboðum í Tórshavn, hetta hóast slík tilboð partvíst eru í lokalsamfelagnum ella í grannakommunum[9]. Kommunurnar báðar verða viðgjørdar á næstu síðunum.

### Hósvíkar Kommuna

Hósvíkar kommuna er í Sundalagnum norðanfyri bygdina Kollafjørð í Tórshavnar kommunu. Við árslok í 2002 búðu 281 fólk í Hósvíkar kommunu (Hagstova Føroya,

2003). Hósvíkar kommuna fevnir um Hósvík og Áir[10], sum er norðanvert Hósvíkar bygd.



Hósvíkar bygd er í eini lítlari vík, umgird av vøkrum fjøllum, eyðmerkt við tveimum áum, ið renna oman gjøgnum bygdina. Sunnanfyri bygdina er eitt havnarlag og ein kei, ið lokalu útróðrarbátarnir brúka. Ikki er óvanligt, at eitt av skipunum hjá felagnum Thor liggur við bryggju í Hósvíkar havn.

Thor er eitt lokalt reiðarí og hartil tann størsti arbeiðsgevarin í Hósvík. Thor varð stovnað í 1993. Í august 2002 átti Thor sjey skip, seks teirra innan tænastuveitingar til oljuvinnuna, og eitt fiskiskip. Virksemi innan oljuvinnuna fevnir víða, og eru skip hjá Thor í bæði Stóra Bretlandi, Hálandi, India og Suður Afrika, umframt í Føroyum (www.thor.fo). Við árslok í 2002 arbeiddu 80 fólk hjá Thor, 74 teirra umborð á skipunum, meðan 6 arbeiddu í umsitingini í Hósvík. Tveir triðingar av manningunum eru føroyingar, meðan restin eru útlendingar (persónligt samskifti). Í 2003 tók Thor í nýtslu nýtt høvuðssæti, sum er á havnarlagnum í Hósvík. Á havnarlagnum er eisini eitt sláturhús, tað einasta av sínum slagi í Føroyum, sum MBM setti á stovn í 1997. Í 2002 fór MBM undir samstarv við PF Poul Hansen Heilsølu um sláturhúsið. Men orsaka av, at sláturhúsið ikki hevur megnað at klára seg mótvegis útlendskum kappingarneytum, varð sláturhúsið stongt 1. mars 2004 (Dimmalætting, 3. mars 2004). Eisini eru einstakir aðrir goymslubygningar á havnarlagnum.

Umframt Thor eru tað nøkur smærri arbeiðspláss í Hósvík. Millum annað er asfaltsgoymslan hjá Landsverkfrøðinginum, sum er tann einasta í landinum, í Hósvík. Innan handil- og tænastuvinnuna er m.a. ein smærri flutningsfyritøka og ein

handilsmaður í Hósvík. Harumframt eru nakrir bøndur í kommununi (Rólantsson, 1999: 160-161). Inntil í februar 2004 var eisini ein deild av Føroya Sparikassa í Hósvík, sum var opin nakrar tímar hvønn dag. Deildin hjá Føroya Sparikassa lat tó aftur í februar í 2004 (Sosialurin 14. Jan. 2004).

Tá kannað verður innan hvørjar vinnur fólk í Hósvík arbeiða, gerst greitt, at flest fólk arbeiða hjá privatum vinnufyritøkum. Men fleiri enn 30 % av arbeiðsstyrkini í Hósvík vóru í 1999 í starvi innan almennar tænastur[11]. Harumframt var ein munandi partur av teimum, ið arbeiddu innan "bygging, handil, flutning o.a.", í starvi innan handil og tænastuvinnur. Fólk, ið arbeiddu innan almennar tænastur ella innan handils- og tænastuvinnur, arbeiddu í flestu førum í Tórshavn.




*Mynd 1. Fólk í vinnu í Hósvík í 1999, býtt á vinnugreinir. (Hagstova Føroya, persónligt samskifti).*

Hóast tað eru nøkur lokal arbeiðspláss, so er arbeiðsstyrkin í Hósvík sum heild í vinnu uttan fyri kommununa. Í 1997 vóru umleið 75 % av arbeiðsstyrkini í vinnu uttan fyri Hósvík. Tveir triðingar av hesum vóru í vinnu í Tórshavn (Hagstova Føroya, persónligt samskifti). Tølini frá 1999 vísa eina enn greiðari mynd, tá fleiri enn 85 % av lokalu arbeiðsstyrkini vóru í vinnu uttanfyri kommununa, og umleið 55 % av hesum arbeiddu í Tórshavn (Hagstova Føroya, persónligt samskifti). Spurningurin um, hvar fólk arbeiða var eisini við í eini spurnarblaðskanning[12], ið Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi í Hósvík í 2001.




*Mynd 2. Hvar hósvíkingar arbeiddu í August 2001. (Kanning gjørd av Granskingardeplinum fyri Økismenning í avgust 2001).*

Umleið 60 % av teimum, ið luttóku í kanningini, vístu á, at tey arbeiddu í Tórshavn (sí Mynd 2).

Tað tekur umleið 25 minuttir at koyra við bussi frá Hósvík til Tórshavn, og um ein koyrir í persónbili, so tekur tað umleið 20 minuttir. Tøl frá Strandfaraskip Landsins vísa, at bert ein lítil partur av teimum, ið fjarferðast millum Hósvík og Tórshavn, koyra við bussi (Strandfaraskip Landsins, persónligt samskifti). Hesi tøl vera eisini staðfest í kanningini, ið Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi í avgust 2001, har bert heilt fá vístu á, at tey koyrdu við bussi til arbeiðis í Tórshavn.

**Kommunal skipan**

Upprunaliga var Hósvíkar Kommuna partur av Hvalvíkar Sóknar Kommunu, sum umframt Hvalvík og Hósvík eisini fevndi um Streymnes og Áir. Men eftir lokala ósemju fór kommunan í tvey í 1954, og Hvalvík og Hósvík gjørdust sjálvstøðugar kommunur (Kommununevndin, 1998: 227).

Í kommunustýrinum í Hósvík eru fimm limir, sum sínámillum velja borgarstjóran. Eins og álagt í Kommunustýrislógini, hevur kommunustýri regluligar almennar kommunustýrisfundir. Kommunustýri hevur ein parttíðar skrivara í starvi, sum eisini er bókhaldari hjá kommununi.

Hósvíkar kommuna umsitur øll vanlig málsøki, ið kommununum er heimilað at umsita, tó undantikið umhvørvismál og brunamál, partar av heilsumálunum og eldrarøkt umframt framhaldsskúla, ið eru viðurskifti, sum vera skipaði í kommunalum samstarvi. Hósvíkar kommuna er partur í fleiri samstørvum millum kommunur. Tað mest víttfevnda og skipaða av hesum, er samstarvið í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, sum umframt Hósvíkar kommunu fevnir um Gjáar, Haldórsvíkar, Hvalvíkar og Sunda kommunur[13]. Í stuttum kann sigast, at Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum umsitur umhvørvis- og brunamál, umframt at Kommunufelagsskapurin í Sundalagnum eisini skipar partar av heilsurøktini í økinum og tann partin av eldrarøktini, sum er kommunalur (Holm og Mortensen, 2002). Umframt samstarvið í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum er Hósvíkar kommuna eisini partur av kommunalum samstarvi viðvíkjandi framhaldsskúla á Felagsskúlanum á Oyrarbakka. Hetta samstarv fevnir um Eiðis, Gjáar, Haldórsvíkar, Hvalvíkar, Saksunar, Sunda og Hósvíkar kommunur.

Sambært Kommunustýrislógini hevur bygdarráðsformaðurin (borgarstjórin) ábyrgdina av øllum viðurskiftum, ið verða viðgjørd og avgreidd av kommununi. Harumframt hevur bygdarráðsformaðurin eisini tað yvirskipaðu umsitingarligu ábyrgdina, bæði av dagliga virkseminum á kommunuskrivstovuni og viðvíkjandi teimum málum, ið verða viðgjørd av kommunustýrinum ella av nevndum í kommunustýrinum. Í eini samrøðu vísti Jógvan Mørkøre, bygdarráðsformaður, á, at í verki var umsitingin av málsøkjum býtt millum bygdaráðslimirnar, sum so hvør í sær hava ábyrgdina av einstøkum málsøkjum. Hendan skipan ger, at bygdaráðslimirnar fáa ein meiri virknan leiklut. Eisini gevur hetta møguleika fyri, at bygdarráðslimirnir kunnu vera virknir innan økið, har tann einstaki hevur serligan áhuga. Í samrøðum við bygdaráðslimir í Hósvík kom greitt fram, at bygdaráðslimir vóru væl nøgdir við hesa skipan, tí á hendan hátt fingu limirnar bæði ávirkan og ábyrgd av ymsum pørtum av kommunalu umsitingini.

Fíggjarliga er Hósvíkar kommuna væl fyri. Kommunan átti í 2002 innistandandi, sum svarar til ½ álíkning (í 2002 var álíkningin í umleið 7 mio kr.), samanborið við at kommunan hevði skuld nøkur ár undan hesum. Jógvan Mørkøre vísti í eini samrøðu á, ”*at í so máta hevur kommunan ein positivan trupulleika. Kommunan hevur sambært íløguloftinum ikki loyvi at gera íløgur fyri meiri enn umleið 1 mio. kr., so kommunan er noydd at seta pengar á bók heldur enn at gera neyðugar íløgur*”.

Hósvíkar kommuna verður eftir 1. januar 2005 løgd saman við 5 øðrum kommunum í og um Sundalagið. Nýggja kommuna kemur at eita Sunda kommuna.

### Almennar tænastur

Síðan 1996 hevur Hósvíkar kommuna skipað fyri dagrøkt fyri børnum, ið eru 10 ár og yngri. Dagrøktarskipanin er skipað við dagrøktarmammum, sum umframt at brúka egið heim eisini møtast í bygdarhúsinum nakrar dagar um vikuna. Í Hósvík eru lutfalsliga nógv børn og tí hevur Hósvíkar kommuna eisini gjørt av at byggja nýggjan barnagarð fyri at nøkta framtíðartørvin.

Hósvíkar Skúli varð bygdur í 1968 og víðkaður í 1975. Í 2000 vórðu teldur keyptar til skúlan, sum nú hevur eina fullfíggjaða teldustova. Skúlin er barnaskúli, har børn ganga til og við 7 flokk. Eftir 7. flokk ganga næmingar úr Hósvík í felagsskúlanum á Oyrarbakka. Umframt fólkaskúlan er ein brandskúli við Áir, sum m.a. verður brúktur av brandmonnum kring landið. Eisini er ein serskúli, ALV skúlin, við Áir, har næmingar við serligum tørvi ganga.

## Broytingar í fólkatalinum

Øll 1960ini og fram til mitt í 1970unum búðu umleið 175 fólk í Hósvíkar Kommunu. Eftir hetta vaks fólkatalið nakað, hetta serliga í fyrru hálvu av 1980unum, tá fólkatalið vaks við umleið 25 %. Í 1986, tá fólkatalið var hægst, búðu 271 fólk í kommununi. Men eftir hetta minkaði fólkatalið, og varð gongdin í fólkatalinum í Hósvíkar Kommunu eins og aðrastaðni í Føroyum merkt av búskaparkreppuni í Føroyum í fyrru helvt av 1990unum. Í árunum 1986 til 1994 minkaði fólkatalið við meiri enn 20 % til 215 fólk, sum er tað lægsta síðan 1979 (Hagstova Føroya, 1995-2003; Landsfólkayvirlitið, 1950-1987.).

Umframt at ávirka sjálvt fólkatalið, so ávirkaði búskaparkreppan í fyrst í 1990unum eisini aldurs- og kynsbýti í landinum. Hetta einamest orsaka av, at tey, sum fluttu av landinum, í stóran mun vóru úr tí yngra ættarliðnum. Hvat Hósvíkar Kommunu viðvíkur, so eru eisini farnar fram broytingar í aldurs- og kynsbýtinum seinastu 20 árini. Hesar broytingar hava m.a.ført við sær, at bólkurin av teimum, ið eru 40 ár og eldri, er vaksin við 10 %. Bólkurin 14 ár og yngri er líka stórur, sum hann var í 1983, men tó við eini áhugaverdari broyting: talið av børnum, ið eru yngri enn sjey ár, er lutfalsliga høgt, og vóru í mars 2003 umleið 50 børn í hesum aldursbólkinum (persónligt samskifti). Aldursbólkurin 15 – 39 ár er minkaður við smáum 10 % (Kommununevndin, 1998: 229; Hagstova Føroya, 1999). Hvat viðvíkur kynsbýtinum, so eru umleið líka nógv konufólk og mannfólk í Hósvíkar Kommunu, tó so eru smærri munur á, tá hugt verður nágreiniliga at teimum ymisku aldursbólkunum.

Búskaparliga gongdin í landinum sum heild er seinnu árini broytt munandi til tað betra, og hevur gongdin í fólkatalinum eisini sum heild verið merkt av hesum. Hetta hevur eisini verið galdandi fyri fólkatalið í Hósvíkar Kommunu. Seinastu fimm árini er fólkatalið støðugt vaksið, og við árslok 2002 búðu 281 fólk í Hósvíkar Kommunu, sum er ein vøkstur uppá umleið 30 % í mun til fólkatalið í 1995. Hetta er eisini tað størsta fólkatalið í Hósvík nakrantíð.

Til- og fráflytingin úr Hósvík hevur verið rættiliga ymisk seinastu fimm árini. Summi ár hevur verið ein lítil fráflyting og onnur ár ein lítil tilflyting. Ein spurnarblaðskanning, ið gjørd varð í Hósvík í juni 2001 vísir, at $^{2}/_{3}$ av teimum, sum eru flutt til Hósvíkar Kommunu í árunum 1995-2000 vóru millum 25 og 40 ár. Hetta bendir á, at tað serliga eru yngri fólk, ið flyta til Hósvíkar. Skrivarin í Hósvíkar Kommunu vísti í eini samrøðu á, at tey tíggju grundstykkini, ið vórðu útstykkjað í 2001, eru øll seld til yngri familjur – og er hetta sostatt eisini greið ábending um, at tað serliga eru yngri fólk, ið flyta til

Hósvíkar. Hartil fór eitt byggifelag undir at byggja raðhús í Hósvík í oktober 2002 – og í mars 2003 vóru 3 av teimum 5 húsunum, sum bygd vórðu í fyrsta byggistigi, seld til fólk, sum flyta til Hósvíkar (Dimmalætting, 19. Mars 2003).

Eins og í Hósvík hevur Kvívíkar Kommuna eisini merkt øktan áhuga í at flyta til Kvívíkar. Hesi viðurskifti verða m.a. viðgjørd í næstu brotunum.

## Kvívíkar Kommuna

Kvívíkar Kommuna er norðanfyri Tórshavnar kommunu og liggur út ímóti sunnasta parti av Vestmannasundi. Við árslok 2002 búðu 580 fólk í Kvívíkar kommunu, 367 fólk í Kvívíkar bygd, 113 í Leynum, 11 á Skælingi, 41 á Stykkinum, og 48 fólk í Válunum[14] (Hagstova Føroya 2003). Kvívíkar bygd er miðstaður í Kvívíkar kommunu. Hinar fýra bygdirnar í kommununi liggja allar rundan um Kvívík, og við undantak av Váli og Skælingi eru bert fáir minuttir frá bygdunum til Kvívíkar (sí Kort 2).



Kvívíkar bygd liggur í vøkrum umhvørvi í eini lítlari vík. Ein á rennur oman gjøgnum bygdina, gjøgnum nýggja býlingin í erva í bygdini, fram við gamla býlinginum í neðra og út í Vestmannasund. Samanborið við Leynar fyri sunnan, har sjóvarmálin er eyðkendur við stórari sandfløtu, er sjóvarmálin í Kvívík í stóran mun hella. Hóast hetta er ein lítil bátahylur, har útróðrarbátar í bygdini halda til í summarhálvuni. Umframt útróðrarmenn eru seks bøndur í Kvívíkar kommunu, ein timburmeistari og ein málarameistari. Ein handil er í Kvívíkar bygd. Onnur lokal arbeiðspláss er fólkaskúlin og barnagarðurin. Inntil fyri stuttum var eisini posthús og ein deild hjá Føroya Sparikassa í Kvívík, sum vóru opin nakrar tímar hvønn dag. Posthúsið lat aftur í 2003,

og deildin hjá Føroya Sparikassa lat, eins og deildin í Hósvík og tríggjar aðrar deildir í landinum, aftur í februar 2004.

Í mun til í Hósvík, har privatar vinnufyritøkur vóru størstu arbeiðsgevarar, so er hetta ikki støðan í Kvívík. Størsti arbeiðsgevarin í Kvívík er almenni sektorurin, har fleiri enn 37 % av lokalu arbeiðsstyrkini arbeiddu í 1999, sí Mynd 3. Hesi størv eru í stóran mun í Tórshavn og fjarferðast fólk tí dagliga til arbeiðis í høvuðsstaðarøkinum. Hvat viðvíkur privatum vinnum, so eru fiskiskapur og fyritøkur innan fiskivinnan á landi (flakavinnan og alivinnan) millum størsti arbeiðsgevarar. Umframt almenna sektorin og framleiðsluvinnur er umleið 32 % av arbeiðsstyrkini í Kvívík í vinnu innan “bygging, handil og flutning o.a.”. Hesi arbeiðspláss eru eisini í ávísan mun í Tórshavn.




*Mynd 3. Fólk í vinnu í Kvívík í 1999, býtt á vinnugreinir. (Hagstova Føroya, persónligt samskifti).*




*Mynd 4. Hvar kvívíkingar arbeiddu í August 2001. (Kanning gjørd av Granskingardeplinum fyri Økismenning í August 2001).*

Sum sagt eru nøkur lokal arbeiðspláss í Kvívík, men meirilutin av arbeiðsstyrkini í Kvívík er í vinnu uttanfyri kommunumark. Ein kanning, ið Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi í Kvívíkar kommunu á sumri í 2001 vísti, at bert 21 % av arbeiðsstyrkini í Kvívík arbeiddi í Kvívíkar kommunu. Fleiri enn 60 % arbeiddu í Tórshavn, 6 % í Vestmanna, 11 % arbeiddu í øðrum grannakommunum ella vóru sjómenn / fiskimenn.

Tað tekur umleið 25 minuttir at koyra úr Kvívík til Tórshavnar við bussi, og umleið 20 minuttir við bili. Eins og galdandi fyri hósvíkingar koyra bert fáir kvívíkingar við bussi,

tá farið verður til arbeiðis í Tórshavn (Strandfaraskip Landsins, persónligt samskifti). Ein av orsøkunum er, at privat-bilisma er sera útbreidd í Føroyum, og at tað er vanligt, at fólk koyra til arbeiðis í egnum bili. Samanborið við tøl frá Danmark vóru í Føroyum í 2001 322 bilar fyri hvørji 1.000 fólk , meðan tað vóru 349 bilar fyri hvørji 1.000 fólk í Danmark sama árið (Danmarks Statistik, 2002; Hagstova Føroya, 2002). Kanningini hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning vísti eisini, at fleiri enn 70 % av teimum í Kvívík, ið svaraðu spurnarblaðnum, koyrdu til arbeiðis í egnum bili.

**Kommunal skipan**

Orsaka av, at fleiri enn 500 fólk búgva í Kvívíkar kommunu, eru sjey limir valdir í kommunustýrið í Kvívíkar kommunu. Við kommunuvalið í 2000 vórðu tríggir av kommunustýrislimunum valdir í Kvívíkar bygd, meðan hinir fýra vórðu valdir í Leynum, á Skælingi, á Stykkinum og í Váli. Tá kommunustýrið skuldi skipast eftir kommunuvalið í 2000, varð roynt at skipa ein meiriluta millum limirnar, ið vórðu valdir uttanfyri Kvívíkar bygd. Men royndin miseydnaðist, tí umboðið úr Leynum valdi at halda fast um politisku uppstillingina framum eitt tilknýti millum bygdir, og førdi hetta eisini við sær, at flokkurin, ið hann stillaði upp fyri, skipaði meiriluta og fekk borgarstjóran.

Í eini samrøðu greiddi borgarstjórin, Heini Holm, frá, at hóast meirilutin í kommunustýrinum stuðlar borgarstjóranum, so eru dømi um, at minnilutin í kommunustýrinum hevur megnað at fingið stuðul frá einum av limunum í meirilutanum. Hetta hevur til tíðir gjørt tað rættiliga trupult at skipað arbeiðið í kommunustýrinum, og kanska serliga í teimum førum, har hetta hevur ført við sær broytingar í fíggjarætlanini, eins og gjørt varð á heysti í 2001, greiddi borgarstjórin frá.

Kommunustýrið í Kvívík hevur regluligar almennar fundir, eins og kravt í Kommunustýrislógini (Kommunustýrislógin § 13, 2000), men hevur kommunustýrið tó umleið 15 fundir, í mun til teir 12, ið lógin krevur. Kommunan hevur ein fulltíðar skrivara, sum umframt at skipa umsitingina eisini er bókhaldari hjá kommununi. Skrivarin hevur drúgvar royndir og hevur áður arbeitt í fleiri enn 20 ár í umsitingini í Tórshavnar kommunu.

Kvívíkar kommuna umsitur øll vanlig málsøki, ið kommunum er heimilað at umsita. Undantikið er tó heilsurøkt og framhaldsskúlin, umframt at kommunan á summum økjum keypir tænastur frá øðrum kommunum. Heilsurøktin er skipað í samstarvi við

Vestmanna kommunu. Næmingar úr Kvívík ganga eisini í framhaldsdeildini í fólkaskúlanum í Vestmanna. Hesar tænastur rindar Kvívíkar kommuna fyri. Kvívíkar kommuna rindar eisini fyri plássi á ellis- og røktarheimum í grannakommunum[15] (Kommununevndin, 1998: 249-251).

Fíggjarliga er Kvívíkar kommuna væl fyri. Í eini samrøðu greiddi borgarstjórin frá, at Kvívíkar kommuna í 2001 átti innistandandi sum svarar til ½ álíkning (í 2001 var skattaálíkningin hjá Kvívíkar kommunu umleið 12 mio. kr.). Hartil hevur kommunan havt yvirskot á fíggjarlógini í fleiri ár. Eins og við øllum kommunum í landinum hevur Kvívíkar kommuna eisini fingið ásett íløguloft. Í samrøðu vísti Heini Holm, borgarstjóri, á, at íløguloftið hjá Kvívíkar kommunu á 2,2 mio. kr. var ein trupulleiki, tí íløgurnar í fólkaskúlan fóru væntandi at blíva umleið 8 mio. kr. bara í 2002. Borgarstjórin vísti eisini á, at hann metti íløguloftið verða ein trupulleika hjá teimum "ríku" kommununum, tí tær verða forðaðar í at gera neyðugar íløgur – íløgur sum tær hava ráð til.

### Almennar tænastur

Tá samanborið verður við aðrar kommunur av somu støðd, so er støðið á almennum tænastum sum heild høgt í Kvívík. Í 1997 varð ein nýggjur barnagarður tikin í nýtslu, har pláss eru fyri 30 børnum. Harumframt skipar kommunan eisini fyri frítíðarskúla fyri børnum í 1., 2., og 3. flokki. Ein kanning sum Dimmalætting gjørdi í Juni 2003 vísti, at gjaldið fyri barnagarðspláss í Kvívík var tað lægsta í landinum. Kanningin vísti eisini, at gjaldið fyri barnagarðspláss í Kvívík var nærum helvtina av gjaldinum í Tórshavn kommunu (Dimmalætting, 3. Juni 2003).

Fólkaskúlin í Kvívík er bygdur í 1976. Børn í kommununi ganga í skúla frá 1. til 7. flokk[16], meðan børnini ganga í framhaldsskúla (8. - 10. flokk) í Vestmanna. Skúlin í Kvívík er væl útgjørdur við bæði teldustovu og einum skúla bókasavni. Harumframt er eisini fimleikahøll og svimjihøll í skúlanum. Men hóast skúlin er rímiliga nýggjur, so setur nýggja Fólkaskúlalógin, ið kom í 2000, krøv til broytingar og dagføringar av skúlanum. Vaksandi barnatal í Kvívík setur eisini krøv til víðkan av skúlanum. H. Holm, borgarstjóri, greiddi í eini samrøðu frá, at hesa broytingar fevna um nýggj krøv til hølisviðurskifti og eina dagføring av skúlanum sum heild. Borgarstjórin greiddi frá, at hesar broytingar væntandi verða gjørdar í 2002. Umframt hetta vísir kommunuskrivstovan í Kvívík á, at skúlin eisini skal útbyggjast í 2003 og 2004.

**Broytingar í fólkatalinum**

Í 1950 búðu 479 fólk í Kvívíkar kommunu. Í 1950unum og 1960unum minkaði fólkatalið við umleið 15 % – og var fólkatalið í 1970 komið niður á 394 fólk, tað lægsta eftir seinna heimsbardaga. Í árunum eftir 1970 vaks fólkatalið aftur. Og í 1988, tá fólkatalið var hægst, búðu 600 fólk í Kvívíkar kommunu – ein vøkstur uppá fleiri enn 50 %, tá samanborið verður við tølini frá 1970 (Hagstova Føroya, 1988-2000; Landsfólkayvirlitið, 1950-1987).

Búskaparkreppan í Føroyum fyrst í 1990unum ávirkaði eisini gongdina í Kvívík. Fólkatalið minkaði nakað í kreppuárunum, men gjørdist tó støðugt á umleið 550 fólkum. Seinastu árini er fólkatalið so aftur vaksið, og við árslok 2002 búðu 580 fólk í Kvívíkar kommunu (Hagstova Føroya, 2002).

Eins og í øðrum pørtum av landinum er alders- og kynssamansetingin í Kvívík nakað broytt tey seinastu ártíggjuni. Millum annað er aldursbólkurin av teimum, ið eru 40 ár og eldri vorðin lutfalsliga størri. Í tíðarskeiðinum frá 1960 til 1999 vaks hesin aldursbólkur frá at vera 21 % av samlaða fólkatalinum í Kvívík í 1960 til 30 % í 1999. Í sama tíðarskeiði minkaði aldursbólkurin av teimum, ið eru 14 ár og yngri, við umleið 10 %. Hesar broytingar eru tó ikki sermerktar fyri Kvívíkar kommunu, men eru áleið tær somu sum í landinum sum heild (Hagstova Føroya, 2000; Kommununevndin, 1998: 246).

Tá hugt verður at alders- og kynsbýtinum, so sæst ávirkanin av búskaparkreppuni fyrst í 1990unum rættiliga sjónliga, kanska serliga við eini minking í aldursbólkinum av teimum 20-24 ára gomlu. Hinvegin eru tey fyrstu tekini um, at Kvívík er broytt til eina bústaðarkommunu eisini sjónlig, tá hugt verður at aldursbýtinum. Talið av kvinnum og monnum í aldursbólkinum 34-39 ár er vaksið seinastu árini. Ein av orsøkunum til hesa gongd kann vera, at fólk hava gjørt av at flyta til Kvívíkar, tá tey eru liðug við útbúgving sína og fara at seta búgv. Til- og fráflytingin úr Kvívík stuðlar eisini upp undir hesa grundgeving. Í 1997 var ein lítil tilflyting til Kvívíkar, men í 1998 og 1999 broyttist gongdin og talan varð um eina lítla fráflyting, serliga orsaka av at fólk fluttu av landinum (helst fyri at nema sær útbúgving). Í sama tíðarskeiði var tó ein lítil tilflyting til Kvívíkar úr Tórshavnar kommunu (Hagstova Føroya, 2000), og bendir hetta á, at fólk hava áhuga í at búseta seg í Kvívík, men framhaldandi arbeiða í Tórshavn. Eftirspurningurin á grundstykkjum og húsum í Kvívík er eisini stórur, og vórðu øll grundstykkini í nýggju útstykkingini, ið gjørd varð í 2002, seld innan stutta tíð. H. Holm

greiddi í eini samrøðu frá, at 11 av teimum 15 grundstykkjunum vórðu keypt av avbygdafólki.

## Fjarferðar og bygdarlív

Sum nevnt hava kanningar í grannalondum okkara bent á, at fjarferðing hevur ávirkan á bygdarlívið, á sosiala lívið í bygdarsamfelagnum umframt ávirkan á møguleikarnar hjá fjarferðum at gerast partur av bygdarlívinum. Ein av høvuðsorsøkunum til hetta er, at fjarferðar brúka stóran part av dagtímunum uttan fyri bygdasamfelagið. Eisini er tað sannlíkt, at fjarferðar, ið hava familju, vilja brúka tíðina eftir arbeiðstíð til at vera saman við familjuni, hetta fyri at viga upp móti vantandi samveru í dagtímunum. Av somu orsøk er tað sannlíkt, at hesir fjarferðar hava trupulleikar við at luttaka í sosialum tiltøkum í bygdarsamfelagnum um kvøldarnar, og við hesum verður tað torførari at samansjóða fjarferðar sosialt í bygdarlívið .

Tað sosiala lívið í einari vanligar føroyskari bygd er á mangan hátt ríkt. Í hesum sambandi fevnir sosiala lívið um alt frá at møtast á gøtuni til og frá arbeiði prát millum bygdarfólk á lokalum arbeiðsplássum ella tá tey hittast á barnagarðinum, tá foreldur fara og koma við børnunum, til tey meiri skipaðu tiltøkini um kvøldarnar, oftast í bygdarhúsunum ella í skúlanum. Samskifti og samvera millum bygdarfólk kann sigast verða sjálv kjarnin í tí sosiala bygdarlívinum, og týdningurin av túnatosi, tá fólk møtast á veg heim frá arbeiði ella frá handilsmanninum, eigur tí ikki at verða undirmettur. Hetta er ein týdningarmikil partur av lokala bygdarlívinum við tað, at tað er á hendan hátt, at ein gerst partur av bygdarsamfelagnum og bygdarlívinum.

Fyrr í tíðini bóru flestu føroysku bygdarsamfeløgini eyðkenni av í ávísan mun at vera sokallaðar funktionellar eindir. Fólk búðu og arbeiddu í størri mun enn í dag í somu bygd og keyptu stóran part av vørunum og tænastunum lokalt. Sosiala lívið í bygdarsamfelagnum var ríkt og fevndi um flest øll fólk í bygdini. Í dag er hetta broytt í flest øllum smærri bygdum í landinum, og hevur helst verið broytt í nøkur ártíggju, og er hetta eisini galdandi fyri Hósvík og Kvívík. Færri lokal arbeiðstilboð og færri lokal handils- og tænastutilboð føra við sær, at fólk leita út um bygdarmark til arbeiðis og til handils. Spurningur er, hvussu hetta ávirkar sosiala lívið í lokalsamfelagnum, og hvussu persónliga tilknýti millum bygdafólk eins og bygdarsamleikin verður ávirkaður? Millum annað hetta verður nortið við í næsta partinum.

## Fjarferðar í Hósvík og Kvívík

Tað er trupult at siga í hvønn mun Hósvík og Kvívík hava verið egnar funktionellar eindir, men fyrr vóru fleiri lokal arbeiðspláss umframt fleiri lokalir handlar og tænastuveitarar . Men hóast at talan var um eitt ávíst tal av lokalum arbeiðsmøguleikum, so var tað ikki óvanligt at fólk arbeiddu uttan fyri bygdasamfelagið. Hinvegin var tað ikki vanligt, at fólk í so stóran mun sum í dag, keyptu vørur og tænastur uttan fyri bygdasamfelagið.

Í dag arbeiða stórir partar av arbeiðsstyrkini í Hósvík og Kvívík uttan fyri kommunumark, serliga í Tórshavn. At fjarferðast til arbeiðis er vorðið ein vanligur partur av gerandisdegnum. Ein kanning, sum Granskingardepilin fyri Økismenning gjørdi í August 2001, vísti, at fleiri enn 75 % av fjarferðunum í Hósvík ferðaðust meiri enn 1 tíma til og frá arbeiði hvønn dag. Í Kvívík var hetta mynstrið enn greiðari, har 85 % av fjarferðunum ferðaðust í meiri enn 1 tíma til og frá arbeiði. Hetta merkir, at ein hósvíkingur ella kvívíkingur, sum arbeiðir 8 tímar um dagin, er heimanífrá millum 9 og 10 tímar um dagin.

Kanningin vísti eisini, at ein meiriluti av fólkunum í Hósvík og Kvívík fóru til handils uttan fyri kommunumark. Í Hósvík vístu fleiri enn 60 % á, at tey í høvuðsheitum keypa *matvørur* uttan fyri kommunumark, meðan 95 % vístu á, at tey í høvuðsheitum keypa *tænastur* uttan fyri Hósvík. Kanningin vísti eisini, at fjarferðar í størri mun gera nýtslu av handils- og tænastutilboðum uttan fyri kommunumark enn ”ikki-fjarferðar”. Myndin í Kvívík er hin sama, men har fer ein enn størri partur av fólkinum til handils uttan fyri kommunumark. Umleið 75 % vístu á, at tey í høvuðsheitum keypa *matvørur* uttan fyri kommunumark, meðan umleið 90 % søgdu, at tey í høvuðsheitum keypa *tænastur* aðrastaðni enn í Kvívík.

Sum nevnt omanfyri vísa kanningar í øðrum londum, at ein avleiðing av, at ein stórur partur av bygdafólkinum eru fjarferðar, kann gerast ein trupulleiki fyri sosiala samanhaldið í bygdini. Hvussu er støðan hesum viðvíkjandi í Hósvík og Kvívík?

### Sosiala lívið í Hósvík og Kvívík

Sosiala lívið í Hósvík er ríkt, við nógvum virksemi í og um bygdarhúsið. Í samrøðum við hósvíkingar varð víst á, at tað í ávísan mun eru fjarferðar, sum eru kjarnan í hesum virksemi. Víst verður eisini á, at fjarferðar hava stóran týdning fyri tað sosiala lívið í bygdini. Í so at siga øllum samrøðum varð dentur lagdur á, at hóast ein stórur partur av

fólkinum í Hósvík eru fjarferðar, so hevur hetta ikki havt nøkur negativ árin á tað sosiala lívið í bygdini. - Heldur hevur talan verið um positiv árin, serliga tí nógvir fjarferðar hava ein virknan leiklut í tí lokala sosiala lívinum. Eisini millum eldri hósvíkingar verður staðfest, at tað hevur havt við sær góð árin á bygdarlívið í Hósvík, at nógv yngri fólk flyta til bygdina. Hvat viðvíkur yngru ættarliðunum, so eru ábendingar um, at tey ikki meta støðuna í Hósvík verða nøktandi, og sóknast tey eftir fleiri tilboðum til tey yngru. Av somu orsøk gera tey nýtslu av tilboðum í Tórshavn ella í grannakommunum fyri norðan.

Fólk, sum eru flutt til Hósvíkar og Kvívíkar seinastu tíggju árini kunnu býtast í tveir bólkar. Tey, sum eru gift ella ættað haðani, og tey, sum ikki hava nøkur ættarbond til Hósvíkar ella Kvívíkar. Ein hósvíkingur úr seinna bólkinum, sum dámar sera væl at búgva í Hósvík, greiddi í eini samrøðu frá, at hann gjørdist sera bilsin, tá hann fann út-av, hvussu ríkt bygdarlívið er í Hósvík. Sjálvur er hann vaksin upp í eini lítlari bygd – og greiddi hann frá, at bygdarlívið har als ikki kann samanberast við bygdarlívið í Hósvík.

Sosiala lívið í Hósvík er sum sagt ríkt um kvøldarnar og í vikuskiftinum, men í dagtímunum er sera lítið virksemi í bygdini – og er bygdin merkt av, at stórur partur av íbúgvunum eru til arbeiðis aðrastaðni. Í eini samrøðu varð greitt frá, at Hósvík ein vanligan dag mitt í viku ofta var merkt av ljóðloysi og kendist bygdin næstan útdeyð. Í somu samrøðu varð tó víst á, at hetta var als ikki støðan um kvøldarnar og í vikuskiftinum.

Hóast sosiala lívið í Hósvík er ríkt, so eru tað altíð nøkur, sum helst vilja halda seg fyri seg sjálvan. Hartil eru tað eisini nøkur, sum bert brúka Hósvík sum "sovi-bý" – og er hetta eisini støðan í Kvívík, hóast hesi hoyra til undantøkini í bæði Hósvík og Kvívík.

Eins og í Hósvík er rættiliga nógv virksemi í bygdarhúsinum, Glæmuni, í Kvívík. Arbeiðsmannafelagið eigur Glæmuna, men húsið verður tó brúkt til alskyns endamál, bæði av lokala ungmannafelagnum, sum brúkar húsið 2 ferðir um vikuna, av sunnudagsskúlanum og av skótunum. Harumframt verður húsið eisini brúkt til tiltøk og veitslur og verður húsið eisini útleigað, eitt nú til vitjandi í Kvívík. Í samrøðu varð greitt frá, at virksemi í Glæmuni kanska ikki er eins nógv og tað fyrr hevur verið. Víst varð eisini á, at tað í ávísan mun vóru tey somu, sum standa fyri tiltøkunum.

Umframt ungmannafelagið, sum er rættiliga virkið, so er eisini eitt kappróðrarfelag í Kvívík, og manna kvívíkingar vanliga tveir bátar. Kappróðrarfelagið hevur staðið seg væl og hevur hetta eisini økt um áhugan fyri felagnum, sum er einasta ítróttarfelag í Kvívík. Ung ítróttaráhugaði í Kvívík gera annars í stóran mun nýtslu av tilboðum í bæði Vestmanna og í Havn. Í Vestmanna er tað serliga hondbólturin, ið dregur, meðan fótbólts-, flogbólts- og svimji áhugaði fara til Havnar at íðka ítrótt. Í eini samrøðu varð greitt frá, at tað er skjótt og lætt at fara til Tórshavnar og gera nýtslu av tilboðum har. Ein, sum flutti úr Tórshavn til Kvívíkar á sumri 2003, greiddi frá, at tað ikki er stórvegis munur á at búgva í Kvívík og Tórshavn, um hugsað verður um møguleikarnar at gera nýtslu av frítíðartilboðum í Tórshavn. Flestøll í Kvívík hava bil og eisini koyra náttarbussar til Tórshavnar í vikuskiftunum, so møguleikarnir fyri at gera nýtslu av tilboðum í Tórshavn eru góðir. Í aðrari samrøðu í Kvívík varð víst á, at tað kanska er ov lætt at fara aðrastaðni, og tí er lítil áhugi í at vera virkin og betra um lokala frítíðarlívið. Hinvegin varð víst á, at avmarkaða fólkatalið í Kvívík helst eisini ávirkar, hvussu nógv virksemi er um kvøldarnar og í vikuskiftinum. Í spurnarblaðskanningini, sum nevnd er omanfyri, nýttu fleiri eisini høvi til at gera viðmerkingar um vantandi lokal frítíðartilboð fyri ung.

Nakrar niðurstøður kunnu gerast út frá kanningunum í Hósvík og Kvívík. Eins og í flestøðrum føroyskum bygdum av somu stødd er lítið virksemi í bæði Hósvík og Kvívík mitt á degi ein vanligan gerandisdag. Men greiðar ábendingar eru um, at fjarferðar í Hósvík eru sera virknir í bygdarlívinum um kvøldarnar og í vikuskiftinum. Sigast kann, at økta sosiala virksemi um kvøldarnar og í vikuskiftinum er ein roynd at viga upp ímóti vantandi sosialari samansjóðing í dagtímunum gerandisdagar. Hetta merkir eisini, at hóast ein stórur partur av fólkinum arbeiðsførum aldri í Hósvík dagliga fjarferðast til arbeiðis uttanfyri bygdina, so hevur hetta ikki havt negativ árin á sosiala lívið í bygdarsamfelagnum – eins og nógvar kanningar aðrastaðni, líkar hesari, vísa. Hvat viðvíkur Kvívík, so eru ábendingar um, at tað ikki er eins stórt sosialt virksemi í Kvívík sum í Hósvík. Ein møgulig orsøkin er, at kvívíkingar í størri mun enn hósvíkingar gera nýtslu av tilboðum í stóru grannakommununum, Tórshavn og Vestmanna. Sostatt eru ábendingar um, at tað hevur týdning fyri sosiala virksemi í Kvívík, at fjarstøðan er stutt til tvey størri pláss, Tórshavn og Vestmanna. Hetta tykist ikki í sama mun vera galdandi fyri Hósvík.

## Fjarferðing sum ein persónlig ætlan

Sum nevnt vísa kanningar í norður Norra, at nógv fólk í smáum kommunum hava valt fjarferðing sum ein part av teirra lívi. Orsøkin til hetta er, at tey ynskja at búgva í teirra heimbygd, har tey halda korini fyri børn eru góð, í vøkrum náttúruumhvørvi, uttan harðskap og aðrar stórbýar-trupulleikar. Harumframt vísa kanningarnar eisini, at ættarbond er týðandi orsøkir til hetta val, umframt at lægri kommunuskattur eisini spælir ein leiklut[17].

Í føroyskum høpi kennast vit eisini við hesar orsøkir til at flyta aftur til heimbygdina og fjarferðast til arbeiðis aðrastaðni. Men umframt hetta hava viðurskifti sum t.d. bíligari bústaður og/ella bíligari grundstykki eisini stóran týdning fyri, hvar ein velur at búseta seg, hetta ikki minst galdandi í og um høvuðsstaðarøkið. Sum nevnt hevur stóri eftirspurningurin eftir bústaði í Tórshavn ført við sær hægri prísir á bæði sethúsum og grundstykkjum í Tórshavn samanborið við aðrastaðni í landinum (Føroya Sparikassi, 2002). Í 2001 kostaðu eini sethús í Tórshavn upp til tvær ferðir so nógv sum eini sethús í bygdunum uttan fyri Tórshavn (Føroya Sparikassi, 2002). Av somu orsøk hava fólk valt at búseta seg í bygdunum kring Tórshavn og fjarferðast til arbeiðis í Tórshavn. Hetta er eisini galdandi fyri nógv fólk í bæði Hósvík og Kvívík, sum eisini vísa á , at ein av orsøkunum til, at tey fluttu til Hósvíkar ella Kvívíkar, var bíligari bústaður.

Í eini spurnarblaðskanning, sum varð gjørd í Hósvík og Kvívík í august mánaða 2001, varð spurt, um ein var fluttur til Hósvíkar ella Kvívíkar innan fyri tey seinastu 10 árini. Í Hósvík svaraðu fleiri enn 25 % av teimum, sum luttóku í kanningini (22 av 85), at tey vóru flutt til bygdina innan fyri tey seinastu 10 árini. Í Kvívík søgdu nærum 30 % (46 av 158), at tey vóru flutt til Kvívíkar í hesum tíðarskeiði. Spurnarblaðskanningin vísti eisini, at næstan øll tey, sum vóru flutt til Hósvíkar og Kvívíkar seinastu 10 árini, fjarferðast til arbeiðis uttan fyri kommunumark – og merkir hetta, at fólk ikki eru flutt til Hósvíkar ella Kvívíkar orsaka av lokalum arbeiðstilboðum. Um hugt verður at aldursbýtinum á teimum, sum eru flutt til Hósvíkar og Kvívíkar seinastu 10 árini, so er ein meiriluti av hesum í aldursbólkinum frá 25 til 39 ár. Hesin aldursbólkur fevnir eisini um fólk, sum nýliga hava gjørt seg lidnan við útbúgving og hava gjørt av at seta búgv. Hetta merkir eisini, at Hósvík og Kvívík draga til sín, tað sum í samfelagsfrøðini verður kallað "*human capital*", sum í nógvar mátar verður mettur at hava stóran týdning fyri eitt lokalsamfelag.

Í spurnarblaðskannigini varð eisini spurt, hví fólk eru flutt til Hósvíkar ella Kvívíkar. Kanningin vísti, at umframt tað, at fólk vóru ættað úr Hósvík ella Kvívík, so varð í høvuðsheitum víst á, at bíligari bústaður og barnavinarligt umhvørvi vóru orsøkirnar til, at tey vóru flutt higar (sí Mynd 5).




*Mynd 5. Hví fólk eru flutt til Hósvíkar og Kvívíkar (Spurnarblaðskanning gjørd av Granskingardepilin fyri Økismenning í avgust 2001)*

Í eini viðmerking á spurnarblaðnum vísti eitt par úr Hósvík á, at orsøkin til, at tey fluttu til Hósvíkar var, at grundøkini vóru bíligari á bygd enn í Havn, umframt at tað var sera trupult at keypa hús og grundstykki í Havnini tá. Umframt viðmerkingar viðvíkjandi bíligari bústaði vóru viðmerkingar um barnavinarliga umhvørvið í Hósvík og Kvívík, m.a. viðmerkti ein hósvíkingur, at "*børnini hava trivist sera væl her í Hósvík*". Aðrar viðmerkingar vístu til vøkru náttúruna og friðsæla umhvørvið. Ein kvívíkingur viðmerkti "*Kvívík er besta stað í Føroyum at búgva*", meðan ein hósvíkingur, sum arbeiðir í Tórshavn, viðmerkti: "*Tað er himmalskt at koma til Hósvíkar aftaná ein dag í Havn.*" Harumframt vóru fleiri viðmerkingar líkar hesari: "*Her er so friðarligt og vakurt*" – har dentur verður lagdur á vøkru náttúruna og friðarliga umhvørvið í bæði Hósvík og Kvívík.

Hóast fleiri (í spurnarkanningini) vísa á barnavinarliga umhvørvið og vøkru náttúruna sum orsøk til, at tey fluttu til Hósvíkar og Kvívíkar, so er tað eisini hugsandi, at hetta eru viðurskifti, sum tey eru vorðin varug við eftir, at tey hava búsett seg í Hósvík og Kvívík.

Afturat týdninginum av bíligum bústaði, barnavinarligum umhvørvi og vøkru náttúruni, so hevur fjarstøðan til Tórshavnar eisini havt stóran týdning, tá fólk hava gjørt av at búseta seg í Hósvík ella Kvívík. Eitt par úr Hósvík viðmerkti í spurnarblaðnum, at "*vit fluttu til Hósvíkar, tí tað er tætt við høvuðsstaðin*" – eitt par úr Kvívík vísti á somu grundgevingar fyri at tey fluttu til Kvívíkar.

Ein niðurstøða, sum kann gerast út frá kanningini, er, at fólk úr Hósvík og Kvívík hava í ávísan mun valt at fjarferðast av persónligum ella familju orsøkum. Hetta merkir í høvuðsheitum, at fjarferðar í Hósvík og Kvívík raðfesta bíligari bústað og barnavinarligt umhvørvi, tá tey hava gjørt av, hvar í landinum tey búseta seg. Greitt er tó, at týdningurin av ættarbondum í Hósvík og Kvívík hava spælt ein leiklut í samband við val av bústaði, umframt at fjarstøðan til Tórshavnar hevur ávirkað. Áhugavert er, at niðurstøðurnar frá hesar kanningini eru líkar niðurstøðunum í norsku kanningini, sum nevnd varð omanfyri.

## Bústaðarkommunur og kommunalar raðfestingar

Flestallar føroyskar kommunur raðfesta høgt at kunna vísa á, at teirra lokalsamfelag rúmar allar partar av lívinum, góðir bústaðar møguleikar, kommunalar tænastur, sum nøkta tørvin hjá børnum og ungum, frítíðar- tilboð, vinnuligar møguleikar o.s.fr. Men fyri nógvar kommunur er tað ikki gjørligt at røkka hesum málsetningum – hóast tað kann tykjast sum bert fáar hava ásannað hendan veruleika.

Hóast tær flestu av teimum smáu kommununum hava lítlar og ongar trupulleikar við at nøkta tørvin á barnaansingarøkinum, so er tað greitt, at nógvar smáar kommunur hava trupulleikar við at draga til sín nýggjar fyritøkur og nýggj arbeiðspláss. Ein av høvuðsorsøkunum til hetta er, at tær smáu kommunurnar eru ikki førar fyri at kappast við tær stóru - hetta er kanska serliga galdandi fyri kommunur í Streymoynni og Eysturoynni, har tær størri kommunurnar hava havt vøkstur bæði í í fólkatali og vinnuligari framleiðslu.

Tað eru ávís tekin um, at smærri kommunur uttanfyri Tórshavn, sum seinnu árini eru broyttar til bústaðarkommunur, hava lagt til rættis nýggjar kommunalar menningarætlanir. Hesar menningarætlanir raðfesta tað at veita allar kommunalar tænastur, sum eru neyðugar fyri, at ein dagliga kann arbeiða uttanfyri kommunumark. Hesin parturin viðgerð spurning um kommunalu raðfestingina og raðfestingina hjá borgarum í Hósvík og Kvívík.

### Raðfesting hjá borgarum og kommunu í Hósvík og Kvívík

Spurningurin um hvussu borgarar í Hósvík og Kvívík vilja, at kommunan skal raðfesta ávís øki, var eisini partur av spurnarblaðskanningini, sum varð gjørd av

Granskingardeplinum fyri Økismenning í august 2001. Í spurnarblaðnum varð spurt, hvussu kommunan eigir at raðfesta hesi øki (svarast skuldi við at skriva tølini 1-5):

- barnaansing, dagrøkt og frítíðarskúla
- fólkaskúlan
- ítrótt
- mentan
- ídnaðarfremjandi tiltøk

Kanningin í Hósvík vísti, at borgarar vilja, at kommunan skal raðfesta fólkaskúlan ovast og síðan barnaansing, dagrøkt og frítíðarskúla (sí eisini Mynd 6 niðanfyri).




*Mynd 6. Raðfesting hjá borgarum í Hósvík (Spurnarblaðskanning gjørd av Granskingardepilin fyri Økismenning í avgust 2001).*

Sum víst í Mynd 6 svaraði helvtin av teimum, sum luttóku í kanningini í Hósvík, at tey hildu, at kommunan skal raðfesta fólkaskúlan ovast, meðan 30 % søgdu, at barnaansing, dagrøkt og frítíðarskúli skuldi raðfestast ovast. Umframt hetta vórðu ídnaðarfremjandi tiltøk eisini raðfest ovarlaga, meðan mentan og ítróttur sambært kanningini hevði lága raðfesting. Afturat valmøguleikunum á spurnarblaðnumo varð eisini viðmerkt á fleiri spurnarbløð, at tørvur var á tilboðum til yngru ættarliðini – og at hetta átti at verðið raðfest hægri.

Spurningurin um kommunalu raðfestingina varð eisini viðgjørdur í samrøðum við teir einstaku kommunustýrislimirnir í Hósvík. Ein niðurstøða, sum kann gerast út frá hesum samrøðum, er, at kommunustýrið í Hósvík leggur stóran dent á at veita borgarunum allar kommunalar tænastur, sum tørvur er á í einum framkomnum samfelag. Fyrst og fremst leggur kommunustýrið dent á at veita tænastur, sum gera tað møguligt hjá borgarunum at fara til arbeiðis, uttan at skulu hugsa um t.d. hvussu tey skulu fáa børn síni ansað. Hetta merkir eisini, at barnaansing og dagrøkt verður raðfest ovarlaga av kommunustýrinum. Ein kommunustýrislimur vísti í eini samrøðu á, at kommunustýrið sum so ikki legði seg eftir at veita góðar tænastur til fjarferðar, heldur var talan um at veita allar tænastur, sum borgarum tørvar fyri at kunna fara til arbeiðis antin í ella uttan fyri bygdina.

Hinvegin vísti ein annar kommunustýrislimur á, at vantandi lokal arbeiðstilboð tvingaðu kommunustýrið at skipa soleiðis fyri, at borgarar fáa møguleika at leita sær arbeiði uttanfyri kommunumark. Lutfalsliga høga barnatalið í Hósvík hevur eisini ført við sær stóran tørv á barnaansingarøkinum, og av somu orsøk hevur Hósvíkar kommuna eisini gjørt av at byggja nýggjan barnagarð.

Høga barnatalið ger tað eisini neyðugt at fremja útbyggingar innan skúlaøki í bygdini og hevur kommunustýrið tí eisini umrøtt at útbyggja um skúlan. Ein onnur týðandi íløga seinastu árini er íløgan í kommunalu vatnveitingina, eitt øki, har íløgur hava verið gjørdar í fleiri ár.

Kommunan hevur eisini gjørt stórar íløgur í havnarlagið m.a. fyri at skapa umstøður til nýggju skrivstovuna og ein goymslubygning hjá felagnum Thor, umframt at onnur lokal feløg eisini hava bygt goymslubygningar á havnarlagnum. Í eini samrøðu greiddi ein kommunustýrislimur frá, at kommunan seinastu árini hevur merkt ein øktan áhuga fyri at sleppa at byggja á havnarlagnum.

Hóast øktur áhugi er í at fáa byggilendi á havnarlagnum, so er Hósvíkar kommuna tó ikki virkin í at leita upp nýggjar íleggjarar, sum kunnu skapa fleiri lokal arbeiðspláss. Ein kommunustýrislimur greiddi í samrøðu frá, at tann økti áhugin í byggilendi á havnarlagnum ikki er nóg áhugaverdur til, at kommunalar íløgur verða gjørdar fyri at ganga áhuganum á møti. Til hetta er Hósvíkar kommuna ov lítil og eitt íløguloft uppá umleið 1 mio. kr. avmarkar eisini møguleikarnar hjá kommununi. Ein stór íløga í fyrireiking av byggilendi á havnarlagnum hevði lagt trýst á kommunala búskapin og

helst eisini ført við sær eina avmarking í íløgumøguleikunum á øðrum økjum í eitt ávíst áramál.




*Mynd 7. Raðfesting hjá borgarum í Kvívík (Spurnarblaðskanning gjørd av Granskingardepilin fyri Økismenning).*

Raðfestingin hjá borgarum í Kvívík eru líkar teimum hjá borgarum í Hósvík – og raðfesta kvívíkingar eisini fólkaskúlan og barnaansing, dagrøkt og frítíðarskúla ovast. Men samanborið við í Hósvík eru tað færri fólk í Kvívík, sum raðfesta ídnaðarfremjandi tiltøk, meðan tað eru nøkur fleiri í Kvívík, sum raðfesta mentan og ítrótt (sí eisini Mynd 7).

Eins og í Hósvík leggur Kvívíkar kommuna dent á at veita góðar tænastur á barnagarðs- og skúla økinum. Í samrøðu við kommunustýrislim í Kvívík varð víst á, at útbyggingin av skúlanum hevur verið raðfest ovast seinastu mánaðirnar. Ein annar kommunustýrislimur greiddi í samrøðu frá, at tað var ein stór avbjóðing at skipa kommunalu barnaansingina, tí bygdirnar í kommunu vóru so spjaddar. Umframt skúlan og barnaansing hevur Kvívíkar kommuna eisini lagt dent á ganga eftirspurninginum eftir grundstykkjum á møti – og hevur kommunan gjørt nýggjar útstykkingar í m.a. Kvívík. Úrslitið er, at fleiri nýggj hús er bygd, bæði í Kvívík og í øðrum bygdum í kommununi.

Hóast stórur partur av fólkinum í arbeiðsførum aldri í Kvívík arbeiða uttanfyri

kommunumark, so roynir Kvívíkar kommuna at raðfesta íløgur, sum hava ávirkan á lokalu vinnulívsmenningina. Í samrøðu við lim í kommunustýrinum varð víst á, at kommunan hevur gjørt av at byggja nýggjan bátahyl í Válinum fyri at betra um umstøðurnar hjá útróðrarmonnunum í Kvívíkar kommunu. Í samrøðuni greiddi kommunustýrislimurin eisini frá, at hann metti, at tað varð neyðugt at kommunan var virkin í at skapa karmar fyri lokalari vinnulívsmenning.

Samanumtikið kann sigast, at kommunala raðfestingin í Hósvík og Kvívík sum heild er sambærilig við raðfestingina, sum borgarar í teimum báðum kommununum ynskja. Í høvuðsheitum merkir hetta, at dentur verður lagdur á at veita tær tænastur, sum tørvur er á, fyri at borgarin kann fara til arbeiðis uttanfyri kommunumark. Heildaruppgávan hjá kommunum er at (royna at) veita tær tænastur, sum borgarin hevur tørv á – tí er tað heldur onki óvæntað, at tað, at Hósvík og Kvívík eru vorðnar bústaðarkommunur, hevur ávirkan á kommunalu raðfestingina.

## Samandráttur og niðurstøða

Í hesum arbeiðsriti er evnið fjarferðing í Føroyum kannað – har kommunurnar Hósvík og Kvívík eru brúktar sum dømi. Menningin av føroyska samfelagnum seinastu ártíggjuni, bæði búskaparliga, men eisini vinnuliga og tøkniliga, hevur skapt gott grundarlag fyri fjarferðing í pørtum av landinum. Hetta hevur higartil serliga verið galdandi fyri Streymoynna og Eysturoynna – sum eisini eru teir partarnir av landinum, (Tórshavnar og Runavíkar økið) sum hava havt størstu búskaparligu framgongdina seinastu árini.

Búskaparvøksturin í Tórshavnarøkinum hevur ført við sær eitt økt tal av vælløntum arbeiðsplássum, sum eisini fevna um arbeiðspláss, ið krevja hægri útbúgving. Men búskaparvøksturin hevur eisini havt negativ árin, og hevur havt við sær økt trýst á bústaðarmarknaðin, umframt at stórur ónøktaður tørvur hevur verið á barnaansingar- og skúlaøkinum. Trýstið á bústaðarmarknaðin hevur ført við sær hægri prísir á grundstykkjum og sethúsum (íbúðum) í Tórshavn samanborið við uttanfyri Tórshavn – umframt at langir bíðilistar hava verið á barnaansingarøkinum. Hetta eru eisini nakrar av orsøkunum til, at fólk hava valt at seta búgv í bygdunum uttan fyri Tórshavn, har sethús og grundstykkir eru bíligari, og har ongir bíðilistar eru, hvat barnaansing viðvíkur. – Og hava hesi fólk sostatt valt at fjarferðast til arbeiðis í Tórshavn.

Um hugt verður at, hvørji fólk eru flutt til Hósvíkar og Kvívíkar seinastu ártíggjuni, so gerst greitt, at talan serliga er um ungar familjur í aldrinum 25-40 ár. Hesar familjur fevna eisini um fólk, sum hava verið uttanlands og nomið sær hægri útbúgving, og sum hareftir hava valt at seta búgv. Hetta merkir eisini, at Hósvík og Kvívík draga til sín tað, ið innan samfelagsfrøðina verður kallað *human capital*, sum í nógvar mátar verður mett at hava stóran týdning fyri eitt lokalsamfelag.

Kanningarnar, sum hetta arbeiðsritið er grundað á, vísa at fjarferðar í Hósvík og Kvívík hava valt fjarferðing sum eina persónliga ella familju ætlan. Hetta merkir m.a., at fjarferðar hava valt at flyta til Hósvík og Kvívík og fjarferðast til arbeiðis í Tórshavn fyri at sleppa at búgva í heimbygdini ella á staðnum, har skyldfólk teirra búgva. Ein onnur orsøk er, at hesir fjarferðar raðfesta eitt gott og friðarligt umhvørvi fyri børnini og familjuna. Bíligari sethús og grundstykkir eru eisini millum orsøkirnar til, at fólk velja at flyta til Hósvíkar og Kvívíkar og fjarferðast til Tórshavnar.

Granskingarverkætlanir, sum kanna fjarferðing, vísa, at fjarferðing kann hava negativ árin á sosiala lívið í bygdasamfelagnum. Hesin spurningur hevur eisini verið partur av kanningunum í hesum arbeiðsriti. Ein niðurstøða er, at tað sosiala lívið í Hósvík og Kvívík er ríkt. Virksemi er sum heild lágt í dagtímunum, tá stórur partur av fólkinum í arbeiðsførum aldri er til arbeiðis uttanfyri kommunumark, men um kvøldarnar og í vikuskiftinum er nógv sosialt virksemi. Ábendingar eru um, at meiri virksemi er í Hósvík enn í Kvívík, og tykist tað serliga vera fjarferðar, sum standa aftanfyri hetta virksemið. Ein niðurstøða kann verða, at økta sosiala virksemi um kvøldarnar og í vikuskiftinum er ein roynd at bøta um vantandi sosialari samansjóðing í dagtímunum.

At enda er gjørd ein kanning av raðfestingunum hjá borgarunum og kommunustýrinum í Hósvíkar og Kvívíkar kommunum. Granskingarverkætlanir av fjarferðing og bústaðarkommunum aðrastaðni vísa, at dømi eru um ósemju um, hvussu kommunan "eigur" at raðfesta – og at talan serliga er um ósemju millum fjarferðar og tey, sum ikki fjarferðast. Ábendingar eru um, at hetta ikki er støðan í Hósvík og Kvívík. Í báðum førum leggur kommunustýrið stóran dent á at raðfesta viðurskifti, sum hava týdning fyri, at fólk kunnu fara til arbeiðis uttan fyri kommunumark. Og tá hugsað verður um, at stórur partur av fólkinum í arbeiðsførum aldri arbeiðir uttan fyri kommunumark, er tað ikki óvæntað, at raðfestingarnar hjá borgarunum og kommunustýrinum í Hósvík og Kvívík eru sambæriligar.

## Kort 2. Útbyggingin av føroyska vegakervinum




Kelda: Økismenningarnevndin, 2001

## Bókmentir


| | |
|---|---|
| Andersen, Anne Kaag. 1999. | *Location and Commuting*. Copenhagen (DK). Ph.D. Thesis No. 85. Institute of Economics. University of Copenhagen. |
| Apostle, Richard, Dennis Holm, Gestur Hovgaard, Ólavur Waag Høgnesen, og Bjarni Mortensen. 2002. | *The Restructuring of the Faroese Economy: The Significance of the Inner Periphery*. Copenhagen (DK). Samfundslitteratur. |
| Aure, Marit. 2001. | *"Innovative Traditions? Coping Processes among Households, Villages and the Municipality". In Nils Aarsæther and Jørgen Ole Bærenholdt (eds.). The Reflexive North.* Copenhagen (DK). Nordic Council of Ministers. Nord 2001: 10. 89-113. |
| Danmarks Statistik. 2002. | *Statistisk Tiårsoversigt 2002*. Copenhagen (DK). Danmarks Statistik. |
| Dalbø, Suni á. 2000. | *Arbeiðsmarknaðarkanning 2000. Rørslur og broytingar á føroyska arbeiðsmarknaðinum.* Tórshavn. Fróðskaparsetur Føroya. |
| Føroya Sparikassi. 2002. | *Ársroknskapur 2001*. Tórshavn. Føroya Sparikassi. |
| Hagstova Føroya. 1995-2003. | *Árbók fyri Føroyar*. Tórshavn. Hagstova Føroya |
| Holm, Dennis og Bjarni Mortensen. 2002. | *Kommunalt samstarv – ein onnur loysn enn kommunusamanlegging*. Klaksvík. Granskingardepilin fyri Økismenning. |
| Kommununevndin. 1998. | *Frágreiðing um kommunurnar. – Nýggj kommunal skipan í Føroyum. Táttur I, Partur II*. Tórshavn. Føroya Landsstýri. |
| Kommunustýrislógin. 2000. | *Løgtinglóg nr. 87. frá 17.05.2000 um kommunustýri.* |
| Landsfólkayvirlitið. 1950-1987. | *Mantalslistar.* Tórshavn. Landsfólkayvirlitið. |
| Landsverkfrøðingurin. 1998. | *Ferðslan 1998*. Tórshavn. Landsverkfrøðingurin. |
| Liepman, Kate K. 1944. | *The Journey to Work: Its Significance for Industrial and Community Life*. London (UK). Kegan Paul. |

| | |
|---|---|
| Løgmansskrivstovan. 2001. | *Staðfesting og raðfesting av uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur*. Tórshavn. Løgmansskrivstovan. |
| Løgtingslóg um fast samband um Leirvíksfjørð. 2002. | *Løgtingslóg nr. 33. frá 26 mars 2002 um fast samband um Leirvíksfjørð.* |
| Madsen, Peter Astrup T. 1984. | *OM PENDLING: Bolig- arbejdsstedsrejser*. Aarhus (DK). Notat 46. Geografisk Institut. Aarhus Universitet. |
| Mørkøre, Jógvan. 1997. | *Labour Force in a Dual Strategy. In Lise Lyck (ed.). The Faroese Economy in a Strategic Perspective*. Stockholm (SE). NordREFO. 215-228. |
| Pickup, L., og S. W. Town. 1983. | *En Europæisk undersøgelse af pendle-trafik og følgerne heraf*. Shankill. Det europæiske Institut til Forbedring af Leve- og Arbejdsvilkårene |
| Rasmussen, Jón. 1977. | *Kollektiv Trafik på Færøerne*. Lyngby (DK). Eksamensprojekt nr. 7/77. Matematisk Institut, Danmarks Tekniske Universitet. |
| Rólantsson, Óla Jákup, ed. 1999. | *Faroe Islands. The New Millenium Series*. Reykjavík (IS). Carol Nord. |
| Strandfaraskip Landsins. 2000. | *Karmar fyri framtíðar virksemi*. Tórshavn. Strandfaraskip Landsins |
| Tkocz, Zygmunt, og Gustav Kristensen. 1994. | *Commuting Distance and Gender: A Spatial Urban Model*. Geographical Analyses 26. pp. 1-14 |
| Vinnumálastýrið. 1999. | *Samferðsluætlan – frágreiðing um framtíðar samferðslu-kervið í Føroyum*. Tórshavn. Vinnumálastýrið |
| Økismenningarnevndin. 2001. | *Økismenningarálitið*. Tórshavn. Mentamálastýrið |


[1] Løgtingið avgjørdi í mars 2002, at undirsjóvartunnil skal gerast undir Leirvíksfjørð. Arbeiðið á tunnilin byrjaði Leirvíksmegin í desember 2003 og Borðoyarmegin í februar 2004. Væntandi verður koyrandi undir Leirvíksfjørð miðskeiðis í 2006 (www.tunnil.fo). Peningur varð settur av á Løgtingsfíggjarlógini til endamálið fyrstu ferð í 2003 og eftir hetta seks ár framyvir, hvørt ár 32,5 mio. kr. (Løgtingslóg nr. 33. 26 mars. 2002, um fast samband um Leirvíksfjørð).

[2] Í Føroyum eru gjørdar einstakar kanningar, sum nema við spurningin um fjarferðing, til dømis frágreiðingin hjá Rasmussen 1977. Men frágreiðingin hjá Rasmussen leggur í størri mun dent á planlegging enn sjálvan spurningin um fjarferðing (Rasmussen, 1977).

[3] Hagtølini eru skipaði soleiðis, at gjørt er upp, hvar fólk búgva í mun til hvar arbeiðsgevarin, ið rindar lønina, er skrásettur. Sostatt kunnu ávísir veikleikar vera við hesum tølunum, við tað, at sjálvt arbeiðsplássið kann vera á øðrum stað enn har arbeiðsgevarin er skrásettur.

[4] Í ávísum pørtum av landinum, har fólkatalið veksur skjótt, eru tað trupulleikar við plásstroti í fólkaskúlanum og ávirkar hetta eisini tørvin á íløgum í lokala fólkaskúlan.

[5] Tað vil siga, at fólk úr allari Streymoynni gera nýtslu av alskyns arbeiðs- og tænastutilboðum (funktiónum) í Tórshavnarøkinum.

[6] Tann stóra kommunuskuldin í Føroyum í 1990unum stavar í stóran mun frá stórum kommunalum íløgum í lokala undirstøðiskervið (havnir, vegir o.s.fr.). Hesar íløgur vórðu mettar sum ein grundleggjandi partur av lokala vinnupolitikkinum.

[7] Í 1930unum, 1940unum og 1950unum hevði kommunan eisini ein týdningarmiklan leiklut í lokalu menningini, tá íløgur m.a. vórðu gjørdar í lokala vegakervið, havnarløg o.s.fr.

[8] Hóast eldrarøkt ikki er ein kommunal uppgáva, so hava fleiri kommunur bygt eldrasambýlið fyri at nøkta lokala tørvin á eldraøkinum.

[9] Síðan kanningin varð gjørd, er tað hugsandi, at støðan í Hósvík eru nakað broytt, við tað at ein størri matvøruhandil er latin upp í Norðskála í 2002.

[10] Í fyrru helvt av 20. øld var ein hvalastøð við Áir, har umleið 100 fólk arbeiddu í summarhálvárinum. Men tá veiðan eftir hvali undir Føroyum steðgaði í 1958, varð hvalastøðin við Áir niðurløgd. Hvalastøðin varð tá keypt av Føroya Landsstýrið, sum í 1960 broytti bústaðarøkið í teirri gomlu hvalastøðini til ein skúla fyri arbeiðstarnaði. Harumframt er eisini ein brandskúli við Áir (Rólantsson, 1999: 160-161).

[11] Almennar tænastur fevna m.a. um: almenna fyrisiting v.m., undirvísing, heilsu- og almannaverk, felagsskapir, mentan o.a. (býtið smbr. Árbókini, Hagstova Føroya).

[12] Spurnarblað varð borið í hvørt hús í Hósvík. Har fólk vóru heima, vórðu spurnarbløð givin øllum í húsinum, ið vóru 16 ár og eldri. Har eingin var heima, vórðu ongi spurnarbløð løgd eftir. Spurnarblaðskanningin varð fyriskipað av Dennis Holm á Granskingardeplinum fyri Økismenning.

[13] Kommunurnar, sum eru í samstarvinum í Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum, umframt Saksunar kommuna, gjørdu í mai 2003 av at leggja saman til eina kommunu. Úrslitið av fólkaatkvøðuni í Hósvíkar kommunu var tó eitt *nei* til kommunusamanlegging, men í fólkaatkvøðuni, sum var í Hósvík í september, gjørdu hósvíkingar av at fara uppí nýggju kommuna, sum verður nevnd Sunda kommuna.

[14] Bygdin Válur er í veruleikanum tættari við Vestmanna enn við Kvívík. Í nógvar mátar er Válur eisini meiri ein partur av Vestmanna enn av Kvívíkar kommunu.

[15] Heini Holm, borgarstjóri, greiddi í eini samrøðu frá, at stóri tørvurin á eldraøkinum gjørdi tað trupult hjá Kvívíkar kommunu at keypa seg inn í ellisheim aðrastaðni.

[16] Næmingar úr Váli ganga tó í barnaskúla í Vestmanna.

[17] Hetta er allarhelst ikki galdandi fyri Hósvík og Kvívík, tí kommunuskattaprosentið í Hósvík og Kvívík hevur verið áleið tað sama um í Tórshavnar kommunu seinastu tíggju árini.